# Millum fantasi og máttloysi

VINNUKRONIKKUR
*Signar P. Heinesen*



Alivinnan krýpur framvið botninum. Rækjuvinnan lítir at reyðum tølum. Flakavinnan hevur ilt við at finna eina gongda leið og fleiri skipaflokkar eru í stórum trupulleikum. Hesin er veruleikin, sum vit vakna upp til og hetta er veruleikin, sum vit sovna við í løtuni.

Øðrumegin hendan veruleikan hómast máttloysi. Hetta máttloysi síggja vit í mongum fiksum setningum, sum mong á almenna pallinum royna at lesa uttanat, soleiðis sum tey hava lisið tað í góðum bókum um búskaparligar gongdir í "teim londum, vit samanbera okkum við". Vit síggja tað eisini í mongum smáputli, sum ábyrgdarpersónar fáast við eins og vit sjálvandi eisini síggja hetta máttloysi í mongum "puffi" millum manna - frustratiónir millum fólk, sum í fleiri ár hava fingist við slíkt, sum í botn og grund eru ókoordineraðir aktivitetir.

Hinumegin hoyra vit um meir ella minni fantasifullar ætlanir, sum roynt verður at flota. Kanningar, forkanningar, granskingarætlanir í hesum og hasum. Onkur roynir entá at byggja heil virkir upp á slíkar ætlanir.

### Føroyar framá

Løgmaður hevur blást í lúður. Nú skulu vit royna at finna felags stev aftur. Við hesum orðum áliggur okkum, hvørjum einstøkum okkara og hvørjum einstøkum virki, at finna best hóskiliga leiklutin. Leiklut okkara í javnvág við leiklutin hjá øðrum persónum, skipanum og virkjum.

Lítil ivi er um, at í hesi prosess koma vit at uppliva frustratiónir, truplar avgerðir, truplar metingar út í óvissuna og fáur kann seta seg afturá og gera, halda, hugsa og meina tað sama sum í gjár. 10-15 ára lang oyðimarkargongd skal avloysast av koordineraðum aktivitetum. 10-15 ár við fiksum setningum og fiksum loysnum skal avloysast av gjøgnumhugsaðum hugtøkum og væl valdum loysnum. Hugtøkini fáa vit oftast uttan úr heimi. Onkur mega vit uppfinna sjálv. Men bert fá hugtøk uttan úr heimi kunnu brúkast kritikleyst uttan týðandi tillagingar til okkara mikrotjóð.

### Hvat vita vit, hvat hóma vit og hvat ber ikki til at vita?

Vit vita, at hóttanin fyri eystan er 10-15 ára gomul og at fyrsta aldan longu hevur floymt yvir londini kring okkum. Tað er hesa alduna, vit kenna á okkum í løtuni í sambandi við fiskivinnuna. Aldargamlar traditiónir, arvur frá teimum, sum undan gingu og eitt gott arbeiði millum okkara fólk í høvuðsvinnuni - bæði í leiðslu, sølu og framleiðslu - er við til at halda hóttanini burtur eina løtu enn. Men vit vita, at vit mega flyta okkum so ella so. Hesa fyrstu alduna nevndu framtíðargranskarar seinnu helvt av áttatiárunum fyri "blue collar revolution", tí tað vóru fólk í arbeiðsklæðum, sum máttu lúta fyri kappingini frá teimum við lágum lønum fyri eystan.

Vit vita eisini, at grundarlagið í dag vil fara undan okkum. Mangt bendir eisini á, at eins og vit í 1998-99 vistu, at alivinnan við táverandi kós vildi renna seg í eina kreppu og at hendan kreppan fór at koma knappliga, vita vit eisini, at flakavinnan, sum vit hava kent hana seinastu hálvu øldina, knappliga missir sítt núverandi grundarlag. Við eitt ber einki til av tí, sum bar til í gjár.

Vit vita, at tann næsta aldan er yvir okkara grannar í løtuni. Teldukøn og onnur høgt útbúgvin fólk í háglønarlondunum mega lúta fyri kappingini. Hesa alduna nevna tey "white collar revolution" - tað eru tær hvítu skjúrturnar og slipsini, sum nú mega lúta.

Vit vita, at eisini hendan hóttanin er yvir okkum.

Vit vita nógv annað eisini, men í hesum høpi er tann mest týðandi vitanin hon, at vit skulu rokna við at gera nógvar royndir út í óvissuna, áðrenn ítøkiligar verkætlanir hepnast í ein slíkan mun, at tað munar samanborðið við teir vinnumøguleikar, sum gleppa okkum av hondum næstu árini. Hetta er galdandi fyri okkara fiskivinnu eins væl og tað, vit í dag nevna "aðra vinnu".

Tí tað ber heilt einfalt ikki til at vita, hvør møguleiki hepnast og hvør ikki hepnast. Ein skipað gongd út í óvissuna verður tann smala gøtan, sum vit noyðast at stíga út á. Ein hómar eina gongda leið, fær onnur við uppá at brúka orku - og halda á, skifta kós, bora fyri, meta um, stíga eitt fet longur, detta og reisa seg aftur. Aftur og aftur og aftur og aftur. Tá ið ein er fyrilagstur, tekur annar við. Onnur hugskot. Somu hugskot, men aðrar arbeiðshættir. Somu hugskot og somu arbeiðshættir, men við betri royndum at byggja á. Somu hugskot, men í eini aðrari tíð.

Í sama mun sum vit seta órealistisk krøv til, hvat ber til at vita, vilja vit liggja í einum kyksendi, har vit søkka djúpari og djúpari, tess meira vit royna at berja okkum upp. Skulu vit vinna framá, noyðast vit at stuðla uppundir hjá teimum, sum royna sítt besta - eisini har onkur snávar ella "ger okkurt býtt".

### Møguleikar ella fantasi

Ein møguleiki er fantasi til tann dagin, hann hepnast. Tá er sama fantasi ein veruleiki. Vit kunnu sum eitt dømi hugsa um, hvussu stórur partur av okkara búskapi í dag er knýttur at svartkjafti, sum fyri fáum árum síðani var sjálv ímyndin av "áttatiárunum", tá ið hetta hugtak enn varð nýtt um "tað markleyst skilaleysa". At vit noyðast út í tað "fantasifulla" er lítil ivi um. Tann avbjóðandi spurningurin er, hvussu vit finna eina javnvág millum fantasi og møguleikar.

At skapa møguleikar burturúr nøkrum fantasifullum er eitt handverk, sum vit vita meira og meira um. Fólk kring allan knøttin granska í hesum og royna at seta orð á. So smátt fáa vit greiðari og greiðari úrslit, sum vit sjálv kunnu royna í verki. Størsta hóttanin móti menningini er ikki fantasi. Øvugt er fantasi eitt av mest týðandi tilfeinginum í menningini. Størsta hóttanin móti menningini er gandaorðið og tann fiksa loysnin.

Eitt gandaorð er eitt viðkomandi orð, sum er tikið burturúr sínum samanhangi - oftast úti í heimi - og sett inn í ein samanhang, har orðið - og øll tann vitan, sum er bygd inn í hetta orðið við áralongum royndum - verður sett í ein sam-

Búskapur og valuta:

# 5000 donsk arbeiðspláss flyta árliga til láglonarlond




BÚSKAPUR
*Rolf Guttesen*
*rg@geogr.ku.dk*



Í Danmark arbeiðir ein "Velfærdskommision", sum skal geva boð uppá hvussu landið í framtíðini skal klára framvegis at hava búskaparligan vøkstur, og framvegis hava eitt vælferðarsamfelg, sum virkar og verður útbygt og endurnýggjað.

### Flyting til Eysturevropa og Asia

Í eini ávegis frágreiðing sigur hendan kommissión, at umleið 5000 donsk arbeiðspláss verða árliga niðurløgd í Danmark og flutt til lond við lágum lønum í Eystureuropa ella Asia. Hetta rák fer at halda fram. Tí er alneyðugt, at Danmark eins og onnur hálønar- og vælferðarsamfeløg, støðugt er ført fyri at seta annað og nýtt í staðin. Tað ræður um at finna uppá og byggja upp av nýggjum.

Vælferðarkommissiónin sigur, sambært Politiken 030305, at danskarar skulu gerast betri til umstilling, um globaliseringin ikki skal taka støðið undan vælferðini í Danmark. *"Dan-marks evne til at konkurrere afhænger i høj grad af, at vi kan producere varer og tjenesteydelser, der har et højt indhold af specialiseret viden"*, skriva teir.

Útflytingin, ella 'outsourcing', er tó bert ein minni partur av tí konstantu umkalfatringini, sum fer fram. Á hvørjum ári verða 250.000 arbeiðspláss í Danmark nirðurløgd, tí virkir stongja, minka um virksemi, rationalisera og effektivisera. Men hinvegin verða nýggj arbeiðspláss eisini sett á stovn. Men í løtuni eru tað ikki nokk til at javnvág verður í roknistykkinum. Tí vaks arbeiðs-loysi í Danmark í januar.

Danmark hevur gjøgnum tíðirnar dugað væl at umstilla seg til nýggjar tíðir.